Kirkjubøar kommuna sóknast eftir

# Leiðara og 3 pedagogum

til Barnagarðin á Velbastað

***Leiðari***

Sum leiðari fært tú her møguleika at gera hugsanir tínar til veruleika um, hvussu ein barnagarður gerst eitt vælvirkandi námsfrøðiligt tilboð í nærumhvørvinum.
Arbeiðsøkið hjá leiðaranum er at leggja ætlanir fyri árið og leiða dagliga virksemið í samsvari við pedagogisku stevnuna hjá stovninum.

Uppgávurnar fevna um upptøku av børnum, fíggjarstýring (bókhald og ársroknskapur verða gjørd av kommununi), at skipa dagliga virksemið, vaktir og innkeyp, at umsita starvsfólkaviðurskifti so sum starvssetanir, lønir, farloyvi, skeið v.m., samstarv og kunning við foreldur, foreldra- og bygdarráð og samskipan av felags tiltøkum annars.

Leiðarin hevur ábyrgd av, at skipanir eru, sum lúka almenn krøv, t.d. innan trygd og heilsu.
Umráðandi er, at leiðarin alsamt dagførir sína vitan á námsfrøðiliga økinum.

***Førleiki***
Leiðarin má hava pedagogiska útbúgving og hegni og áhuga fyri leiðslu. Til ber at víkja frá útbúgvingarkravinum, men umsøkjari má skjalprógva aðra viðkomandi útbúgving og leiðsluroyndir.

***Setanarviðurskifti***
Starvið er frá 1.juni 2002, men vit bíða fegin eftir rætta fólkinum. Lønin verður eftir avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið/kommunurnar.
Harumframt er møguleiki at tingast um viðbót.

***Pedagogar***

Vit sóknast eftir trimum pedagogum, einum til hvørja stovu.

Høvuðsuppgávan er at skapa fastar, tryggar karmar um dagin hjá børnunum, og við spæli og øðrum tiltøkum, t.d. húsligum uppgávum, at hjálpa børnunum at mennast sum einstaklingar og sum partar av størri heildum.

Arbeiðið fevnir um planlegging, praktiskar uppgávur í sambandi við máltíðir og ansing annars, og um íverksetan av tiltøkum og spølum.

***Førleiki***
Umsøkjarar mugu hava pedagogiska útbúgving. Royndir innan arbeiði í vøggustovu/barnagarði eru ein fyrimunur, men ikki fortreyt.

Annars er av týdningi, at umsøkjarar kunnu arbeiða sjálvstøðugt, hava góð samstarvsevni og vilja vera við til at seta sín dám á stovnin.

***Setanarviðurskifti***
Størvini eru frá 1. juni 2002 ella skjótast til ber. Tó kunnu vit bíða eina tíð eftir tí rætta umsøkjaranum. Arbeiðstíðin kann vera 40, 35 ella 30 tímar um vikuna. Lønin verður eftir avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið/ kommunurnar. Í umsóknini kann vera tilskilað, um umsøkjarin hevur ynski um at arbeiða í ávísari stovu.

Vit hava um neyðugt pláss á stovninum fyri børnum teirra, sum sett verða í leiðarastarvið og pedagogstørvini.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Elina Henriksen, leiðara, á tlf. 328121 / velbarn@post.olivant.fo ella Óluvu Niclasen, bygdarráðslim, á tlf. 328145 / oluvanic@hfs.fo

***Umsókn***
Umsókn saman við prógvum og upplýsingum um royndir skulu sendast Kirkjubøar kommunu v/Annfinn Brekkstein, 176 Velbastaður innan **1. apríl 2002**.

KIRKJUBØAR KOMMUNA

Barnagarðurin á Velbastað er ein kommunalur stovnur við einari fíggjarætlan uppá 2,3 milliónir árliga. Stovnurin liggur í friðaligum umhvørvi við stórum spæliplássi og haganum rundanum.

Har eru 40 børn av Velbastað, úr Kirkjubø, úr Syðradali og úr Havn. Børnini eru millum 1/2 og 9 ár og eru í trimum stovum, har aldursbýtið er 0-2 ár, 2-4 ár og 4-9 ár. Tað eru 11 starvsfólk, svarandi til umleið 9 fulltíðarstørv.

Endamálsorðingin hjá stovninum er frá 1997 og soljóðandi: "Endamálið er at skapa fjølbroyttar menningarmøguleikar, bæði kropsliga og sálarliga og tryggja, at børnini faa nógvar og ríkar upplivingar. Vit ynskja, at børnini ótarnað skulu sleppa at spæla; harumframt skulu tey sleppa at vera við til at taka avgerðir, og starvsfólkini skulu lurta eftir teimum og geva sær stundir til tey."



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Málsviðgeri til kommunalu skattakærunevndina

**Starvsøkið**
Arbeiðsuppgávurnar fevna m.a. um at viðgera kærur hjá kommunalu skattakærunevndini, sum er kærumyndugleiki hjá skattgjaldarunum í Tórshavnar, Nólsoyar, Kirkjubøar og Hest kommunu.

Harumframt verður eisini talan um ymiskt annað arbeiði hjá Tórshavnar kommunu. Uppgávurnar verða fjølbroyttar í eini flextíðarskipan og geva viðkomandi møguleika fyri fakligari og persónligari menning.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava útbúgving sum merkonom í roknskapi/skattarætti ella líknandi útbúgving. Hevur umsøkjari ikki neyðugu útbúgvingina ber til at taka hana eftir setan. Tað kann verða ein fyrimunur, at umsøkjari hevur royndir á skattaøkinum ella innan almenna fyrisiting. Kunnleiki til edv á brúkarastøði er neyðugur.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett skjótast til ber. Lønar- og setanartreytir annars verða ásettar sambært sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Leif Madsen, deildarleiðara, ella Jens M. Poulsen, kommunustjóra tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
við upplýsingum um útbúgving, arbeiðsroyndir og avritum av prógvum eins og møguligum viðmælum o.ø. skal verða Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO- 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 5. apríl 2002.

SNARSKIVAN



## 20 tonsari »MB Syðraberg« til sølu

Veiðiloyvi 80 dagar á landgrunninum, 30 dagar á Føroya Banka og 50 tons íslandskvota.

Boð undir 1,1 millión ongan áhuga.

**Tlf. 361753 ella 287753**



## Maður søkist

Vit sóknast eftir einum tilkomnum manni.

Viðkomandi skal vera arbeiðssamur, fyrikomandi og handigur.

Stóra koyrikortið er ein fyrimunur, men tó eingin treyt.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

**Sp/f Eikin**
Postboks 2203 • 165 Argir



SJÓVAR KOMMUNA

## Kunngerð

**um framløgu av broytingum av byggisamtykt**

Sambært løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954, um byggisamtykt og býarskipan við seinni broytingum, verður við hesum gjørt kunnugt, at uppskot til broytingar av byggisamtyktini fyri Sjóvar Kommunu í samband við nýtt bústaðarøki inni í Bø, verður lagt fram til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 20. mars til 10. apríl 2002.

Møgulig mótmæli skulu verða skrivlig, og verða kommunustýrinum í hendi í seinasta lagið 20. juni 2002.

**Sjóvar kommuna**
490 Strendur





# Fjarðahús

- frá dreymi til veruleika



Vestmanna Timburhandil · Tel 472 000 · vt@vt.fo · www.fjardahus.fo



SUDUROYAR SJÚKRAHÚS
800 Tvøroyri

## Sjúkrasystur til sjúklingadeildina

Søkt verður eftir avloysara fyri sjúkrasystir í barnsburðarfarloyvi í tíðarskeiðnum 1. mei 2002 til 1. januar 2003. Starvið er í fullari tíð og í øllum vaktum.

Løn- og setanartreytir sambært sáttmála millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til fyristøðukvinnuna tlf. 371133 lokal 128.

Skrivlig umsókn við prógvum og autorisatión skal sendast til:

Umsjónarmannin
**Suðuroyar Sjúkrahús**
800 Tvøroyri

Umsóknarfreist: 15. apríl 2002.



# Várútsøla

**- n ggjar og gó ar brúktar**

**Derbi Predator skutari**
nýggjur, gráur/orange
nýprísur 19.295,-, **Nú 17.500,-**

**Derbi Predator skutari**
árg. 07/01, km 1650, reyður, vælrøktur,
nýprísur 19.295,-, **Nú 16.500,-**

**Derbi Senda SM Cross**
árg 09/01, km 685, svørt, vælrøkt,
nýprísur 20.595,-, **Nú 17.800,-**

**Derbi Senda SM Cross**
árg. 05/01, km 1520, svørt, skøvur o.a,
nýprísur 20.595,-, **Nú 15.500,-**

**Yamaha Aerox skutari**
árg. 07/01, km 2690, gráur, vælrøktur,
nýprísur 22.000,-, **Nú 18.000,-**

**Jincheng JC 50 Q-8 prutl**
nýtt, reytt,
nýprísur 18.495,-, **Nú 16.000,-**

**Jincheng JC 50 Q-7 minicross**
nýggj, blá,
nýprísur 13.495,-, **Nú 10.000,-**

**Sigma Import**
**Porkeri, tlf. 373921 - 221464**
**http://sigma.port5.com**



LØGMANSSKRIVSTOVAN

## Valrættur hjá lesandi uttanlands

Gjørt verður kunnugt, at:

Sambært § 2a. í ***Løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Føroya Løgting,*** hava persónar, sum vegna útbúgving fyribils hava tilhald uttan fyri Føroyar, valrætt til løgtingið, um teir annars lúka treytirnar fyri vælrætti. Hesir persónar hava tó bert valrætt, um so er, at teir frammanundan fráflyting úr Føroyum hava verið skrásettir í fólkayvirlitinum í Føroyum í minsta lagi 5 ár tilsamans.

Veljarar, ið koma undir hesa áseting, verða eftir áheitan upptiknir á vallistan í teirri kommunu, har teir seinast hava verið skrásettir í fólkayvirlitinum. Tað er ein treyt fyri upptøku á vallistan, at veljarin hevur sent inn umsókn á serligum umsóknarblað, og at avgerðin um upptøku á vallistan er tikin í seinasta lagi 3 vikur áðrenn valdagin. Gevi gætur, at freistin at taka avgerð um upptøku á vallista til løgtingsvalið 30. apríl 2002 er úti 9. apríl 2002.

Undir punkt 4 á umsóknarblaðnum stendur "váttan frá útbúgvingarstovninum". Hetta kann gerast við, at útbúgvingarstovnurin váttar á umsóknarblaðnum, serligum skjali ella at avrit av galdandi lestrarkorti verður hjálagt.

Umsóknarbløð eru tøk á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni www.tinganes.fo undir *Kunningartilfar / ymiskt tilfar.*

**Løgmansskrivstovan**



## Frá Suð urstreymoyar Sjálvstýrisfelag

Ársaðalfundur felagsins verður á Landsbókasavninum hósdagin tann 4. apríl kl.19.30.

Skrá sum áður lýst.

**Nevndin**



## Kassafólk til Miklagarð

**Miklagarður í SMS sóknast eftir kassafólki at byrja skjótast tilber.**

Arbeiðstíðin er seinnapartar og í vikuskiftinum.
Løn eftir sáttmála við S & K.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina skrivliga umsókn til Miklagarð. Tú kanst eisini seta teg í samband við Johnny Priess, um tú vilt hava meira at vita.

MIKLAGARÐUR
SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn
Tel 31 30 11





## Tyrluflúgving um páskirnar

| | | |
|---|---|---|
| Skírisdag | 28/3 | verður flogið sum fríggjadag |
| 2. Páskadag | 1/4 | verður flogið sum sunnudag |

ATLANTIC AIRWAYS



Sosialurin
-tað loysir seg